KAPPINGARÁRIÐ 2012-13

# H71

faldari 8

ATLANTIC AIRWAYS KAPPINGIN

## H71 - StÍF

Sunnudagin 14. apríl kl. 16.00

Hoyvíkshøllin



J & K

FØROYA TELE

NORÐOYA SPARIKASSI

Hotel Føroyar ★★★★

P/F THOMAS DAM
ÍTRÓTTARDEILDIN · N. Finsensgøta 5 · Tel. 31 14 03

Advokatfelagið
Yviri við Strond 4

polytan




VANLUKKUTRYGGING

# Fyrivarin heldur **enn eftirsnarin**



Ein vanlukkutrygging er ein trygdarnót fyri teg og tíni. Onki er so virðismikið sum lívið og ein góð heilsa. Við eini vanlukkutrygging kanst tú tryggja teg fíggjarliga, skuldi tað óhugsandi hent – bæði til gamans og álvara.

↘ trygging.fo

Betri pensjón

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR

# H71.FO – HIMNAHERJANDI HEIMASÍÐA FYRI HOYVÍKINGAR!

Tað tók sína tíð, bestapartin av einum hálvári, men hey!, djúpt má hann níga, ið kyssa skal hønureyvina. Ella, var tað "fram kemur hann, ið hóvliga fer"? Kanska, men har er so onki hóvligt við nýggju heimasíðu felagsins.

Felagið ynskti heimasíðu, sum stílar høgt. Og úrslitið er hareftir. Vit tosa heimasíðu, ið stendur altjóða heimasíðum kurl, hvat íløgu og ambitiónsniveau annars um ræður.

Við sirka 300 limum, og um vit so fleirdobbla við teimum, ið varða at hesum limum og hjálparfólki, verður snotuliga heimasíðan heimstaður hjá øllum H71arum og hoyvíkingum. Tessvegna "Heima í Hoyvík", sum tað so væl stendur ovast á síðuni til høgru fyri vínreyða búmerkið.

Tað er tí Heini Festirstein, sum hevur desainað heimasíðuna. "Lekra og praktiska"— júst sum fyriskrivað. Sendistovan hevur forritað. Vit takka báðar partar fyri avbera gott arbeiði og framhaldandi gott samstarv.

Carl Herup Høgnesen kemur at taka sær av tí meiri skipanarliga kring síðuna, meðan Anfinnur Hovgaard er komin framat til tess at leggja tilfar regluliga út á heimasíðuna.

Men hetta er tilfar, vitonnur síggja til. Tað er, líka frá foreldrum og spælarum til hondbóltsáhugað og venjarar, síðan er



ætlað, og tí eru tað eisini tit, ið mugu levera og hjálpa til við at kasta lív í okkara snotuligu heimasíðu. Eitt nú dystarfrásagnir við myndum, stuttligt og spennandi upplivilsi ella tiltøk, ella onkur hissini anekdota um hondbóltslívið, skal sendast til Agga Niclasen á h71faldarin@gmail.com, ið síðani fer beina leið víðari...

Einki er so leiðiligt sum ein óvirkin heimasíða. Tá er alternativið, deyði!, at taka framum. Eitt nú, tá ið vit tosa "dystarfrásagnir", tá er at senda til omanfyrinevnda meylbústað, hon verður lættliga gjøgnumlisin fyri eyðsýnligar villur, men innihaldið verður verandi órørt.

Slík frásøgn skal, í tráð við felagsins politikk, ikki bara snúgva seg um toppskoraran, men málmann og samlaða verjupartin. "Sonja í Siloini stýrdi verjuni heilt fyrimyndarliga". Ella "tað lá væl fyri hjá vonginum ídag at leggja press". Og tit mugu so øgiliga gjarna viðhefta eina mynd, tí myndaleysur tekstur í heusm høpi er sum strúkijarn uttan tilhoyrandi bretti–dekan berskøllut. Tey ungu elska at síggja seg sjálvi, so tað er bara at díkja á við myndum.

(Tað er ikki akkurát ov mikið av hesum, profilering av hesum slag, og í slíkt mát, at vit elva óúthaldandi og egotrippandi børn, mini-Gudar at síggja til. So, sum sagt, tað er bara at klikka!)

Aðrar funkur og møguleikar eru at vera virkin á síðuni, so tað er bara at gleða seg og koyra á.

Tí har hin fyrra var kriminelt simpul í uppseting og ressursum, er tann nýggja flott samtíðis sum hon rúmar væl fleiri møguleikum, hvat Hoyvíkin og H71 sum er, fær óbøtandi gagn av. Bæði leikarir og venjarir, hjálparfólk og nevnd, viðhaldsfólk og stuðlar. So mikið er sikkurt.

Tillukku allir H71arir, allir hoyvíkingar!

Agga Niclasen


**Ítróttarfelagið Hoyvík H71**
Hoyvíkshøllin, Postsmoga 1067
188 Hoyvík · www.h71.fo

**NEVND**
Sunneva Jakobsen, formaður
sunneva@liv.fo, 23 11 15

Gunn Ellefsen, næstformaður
ge@lawfirm.fo, 59 30 40

Agga Niclasen, nevndarlimur
h71faldarin@gmail.com, 50 86 89

Anna Dam, nevndarlimur
ad@lawfirm.fo, 51 90 82

Hallur Danielsen, kassameistari
hdanielsen@sbwcargo.com, 23 96 15

René Dahl Olesen, skrivari
renedo@faroeship.fo, 54 90 10

**SAMSKIPARI**
Hallur Danielsen
hdanielsen@sbwcargo.com

**HEIMASÍÐUUMSITARI**
Carl Herup Høgnesen
carlherup@gmail.com

Agga Niclasen
H71faldarin@gmail.com

**FALDARAUMSITARI**
Agga Niclasen
h71faldarin@gmail.com, 50 86 89

**SNIÐ, UMBRÓTING, PRENT OG LIÐUGTGERÐ**
Pf. Føroyaprent, www.foroyaprent.fo
– svanamerktur prentlutur 541 705

**MYNDIR**
Jan Egil Kristiansen
26 22 40

**ÚTGEVARI**
H71

**NORÐOYA SPARIKASSI**




Gullkonta er eitt tilboð til ung 13-25 ár og umfatar tvær kontur: Gull 1, ið er ein lønarkonta, og Gull 2, ið er ein samansparingarkonta, báðar við høgari rentu.

Tá tú gerst 13 ár, verður tú boðin til eitt prát við tín ungdómsráðgeva. Tú fært Gullálmanakkan, ið kemur út fyrst í august mánaði hvørt ár, og tú fært lekra Gullryggsekkin.

Sum Gullkundi fært tú nógvar fyrimunir!

Dømi um tænastur til ung:

- Fleiri ymisk gjaldkort
- Netbankin og Netbankin sum app
- Boðtænastan
- NemKonta
- Ráðgeving um samansparing og lán

Saman við ungdómsráðgeva tínum kanst tú fáa yvirlit og góða ráðgeving um hvussu tú lættliga kanst greiða tíni fíggjarligu viðurskifti.

Kom inn í sparikassan til eitt ungdómsprát. Saman finna vit tænasturnar, ið hóska tær.



**Tórshavn**
**Saltangará**
**Klaksvík**

# H71 DREINGIR 16A ERU FØROYAMEISTARAR!

D16A SPÆLDU Í DAG AVGERANDI DYSTIN UM FØROYA-MEISTARAHEITIÐ Í HOYVÍKSHØLLINI MÓTI STÍF. H71 VANN 20- 17 OG TRYGGJAÐI SÆR HARVIÐ MEISTARAHEITIÐ.

*Eftir: Jonhard Klettheyggj*

**SPENNANDI KAPPINGARÁR**

Kappingin í ár hevur verið ófatiliga jøvn og spennandi, og vit hava sæð nógvar sera góðar hondbóltsdystir. Undan dystinum í dag vóru trý lið jøvn við 17 stigum. StÍF og Kyndil høvdu 17 stig fyri 11 dystir, meðan H71 hevði 17 stig fyri 10 dystir. H71 skuldi eftir ætlan spæla ein dyst afturat móti ÍA, men beint undan dystinum í dag komu boðini um, at ÍA ikki kundi manna lið til dystin, sum H71 tí vann uttan dyst. Afturat hesum kom, at Kyndil hevði vunnið seinasta dystin í hesum umfarinum móti ÍA. Hetta hevði við sær, at um H71 vann ella fekk javnt í dag móti StÍF, so vóru H71 meistarar, Kyndil fekk silvur, og StÍF fekk bronsuna. Um H71 hinvegin snávaði, so fór Kyndil avstað við gullinum, StÍF fekk silvur og H71 bronsu. Nervarnir vóru tí øgiligir undan dystinum í dag, serliga millum H71-foreldrini, sum aftur í dag sótu trúgv á áskoðaraplássunum.

**DYSTURIN Í DAG**

Hesi bæði liðini spældu eisini fyri einari viku síðani í høllini á Skála, og endaði tann dysturin við 22-24 til H71. Lagt varð tí upp til ein sera spennandi dyst, og tað fingu vit eisini frá fyrsta bríksli. Serliga í verjupartinum spældu bæði liðini fyrimyndarliga, og málmenninir hjá báðum liðum stóðu væl. At so var, vitnaði máltalvan eisini um, tí aftaná fyrstu 25 minuttirnar var støðan 8-7 til H71, og ikki var frítt eitt sindur av fjáltri enn var á onkrum pápa á bonkinum. Liðini fylgdust annars til støðan var 3-3; síðani megnaði H71 at koma framum 6-3, men hesin munurin tódnaði skjótt aftur til hálvleiksstøðuna 8-7. Í byrjanini á seinna hálvleiki fekk H71 ein lítlan hvøkk, tá ein útvísing hevði við sær, at StÍF kom innanftur í dystin og legði seg framum 9-10. Men okkara dreingir fótaðu sær skjótt aftur og komu framum aftur við trimum málum, so støðan gjørdist 13-10 til okkara. Aftaná hetta fekk StÍF ongantíð aftur fatur á H71, sum allatíðina var 2-4 mál frammanfyri.

**EINSTØKU SPÆLARARNIR**

Sum áður nevnt spældu allir sera væl í verju-partinum og vóru tendraðir og klárir at hjálpa hvørjum øðrum. Serliga Kári, Ólavur og Suni gjørdu sína skyldu í verjuni. Hetta sást eisini aftur í gulu kortunum og teimum 3 útvísing-unum, sum okkara spælarar fingu, meðan StÍF fekk eina útvísing.

Aksel stóð í málinum meginpartin av dystinum, og serliga í fyrra hálvleiki stóð hann ein brand-dyst við 11 bjargingum, meðan hann hevði 5 bjargingar í seinna hálvleiki. Elberg kom inn í málið, tá støðan var 17-14. 7 minuttir vóru eftir, og StÍF hevði fingið brotskast, sum Elberg tók hegnisliga. Aftaná hetta koyrdi H71 dystin trygt heim.

Stóri málslúkurin hjá H71 í dag var Hilmar Leon, sum skoraði 11 mál, harav fleiri vóru



uppá skjótálop. Verjan hjá StÍF ansaði sera væl eftir Pæturi, sum altíð er ein hóttan fyri mótstøðuliðini. Hann fekk tí bert fekk 4 mál í dag. Suni hevði fleiri dundurskot og skeyt 4 mál, meðan Djóni fekk 1 mál. Serliga miðskeiðis í seinna hálvleiki koyrdi álopsspælið sera væl, og verjan hjá StÍF hevði ilt við at fylgja við, tá Suni, Hilmar og Djóni bjóðaðu av í vinstru síðu.

Hesir mannaðu liðið hjá H71 í dag: Aksel Berg, Elberg E. Klettheyggj, Djóni Gaard Joensen, Pætur Thomsen, Hilmar Leon Jakobsen, Suni Højgaard, Kári Nielsen, Ólavur Joensen, Høgni M. Høgnesen, David Heinesen, Beinir Ólavsson, Andrias S. Eltør og Steingrímur Hallsson.

**ENDALIGA STØÐAN Í TOPPINUM GJØRDIST:**

| | | |
|---|---|---|
| 1. | H71 | 21 stig |
| 2. | Kyndil | 19 stig |
| 3. | StÍF | 17 stig |
| 4. | Neistin | 15 stig |

Hjartaliga tillukku dreingir - tit náddu málinum, sum tit settu tykkum tíðliga í kappingarárinum!

Tillukku Hoyvík – framtíðin er enn svørt og bjørt!

## HOYVÍKSHØLLIN

| Kl. | Mánadag | Týsdag | Mikudag | Hósdag | Fríggjadag |
|---|---|---|---|---|---|
| 06.30 | | G14/G17 | D10/D12 | D14/D16 | G12/G10 |
| 07.00 | | G14/G17 | D10/D12 | D14/D16 | G12/G10 |
| 15.00 | D12 | D12 | G12 | Neistin | Kyndil |
| 15.30 | D12 | D12 | G12 | | |
| 16.00 | D10 | D10 | U8 | | |
| 16.30 | D10 | D10 | U8 | | |
| 17.00 | G12 | D10 | G10 | G12 | D14 |
| 17.30 | G12 | G10 | G10 | G12 | D14 |
| 18.00 | G14 | G10 | IA | D10 | G14 |
| 18.30 | G14 | AA | | D10 | G14 |
| 19.00 | AA | AA | | D10 | AA |
| 19.30 | AA | AA | | AA | AA |
| 20.00 | D14 | D14 | D16/D18 | AA | G17/Kvinnur |
| 20.30 | D14 | D14 | D16/D18 | AA | G17/Kvinnur |
| 21.00 | D16/D18 | G17/Kvinnur | G14 | D16/D18 | |
| 21.30 | D16/D18 | G17/Kvinnur | G14 | D16/D18 | |
| 22.00 | D16/D18 | G17/Kvinnur | | D16/D18 | |
| 22.30 | | | | | |

| Deildir | Viðmerkingar |
|---|---|
| AA | Mánadag: møta kl. 18 (renniskógvar og uttanduraklæðir), týsdag: crossfit kl. 17.30, hósdag: crossfit kl. 18.30, fríggjadag: møta kl. 18.00 (renniskógvar og uttanduraklæðir) |
| D16 | |
| D14 | |
| D12 | Fyribils eru venjingarnar mánadag og týsdag. SvL hósdag kl. 19.30-20.30 og fríggjadag kl. 20.00-21.00 |
| D10 | Mánadag byrjar venjingin í Hoyvíkshøllini kl. 15.30. |
| KV | |
| G17 | |

| Deildir | Viðmerkingar |
|---|---|
| G14 | |
| G12 | Mánadag og hósdag byrjar venjingin í Hoyvíkshøllini kl. 16.30. Morgunvenjingin fríggjadag er saman við G10 |
| G10 | Hoyvíkshøllin fríggjadag kl. 14.00-15.00 |
| U8 | Umframt venjingina í Hoyvíkshøllini venja U8, bæði gentur og dreingir, í Skúlanum við Løgmannabreyt hvønn týsdag kl. 16.30-17.30 |
| U6 | Venjing hvønn týsdag kl. 17.30-18.30 í fimleikahallunum í Skúlanum við Løgmannabreyt. Byrjað verður týsdagin tann 2. oktober. |

## VENJARAYVIRLIT H71 KAPPINGARÁRIÐ 2012/2013

| Deild | Heiti | Navn | Tlf | Teldupost |
|---|---|---|---|---|
| AA/1.deild | Høvuðsvenjari | Petur Mittún | 21 82 84 | peturmittun@gmail.com |
| AA/1.deild | Hjálparvenjari | Halgir Dahl Olesen | 54 90 10 | halgir@faroeship.fo |
| AA/1.deild | Málmansvenjari | Jens á Skipagøtu | 28 03 25 | jens.a.skipagoetu@skulin.fo |
| AA/1.deild | Kroppsligur venjari | Snorri Patursson | 22 28 14 | snorripatursson@hotmail.com |
| AA | Liðleiðari | Lars Tornefeldt | 26 62 87 | lars_tornefeldt.hotmail.com |
| AA | Hjálpari | Rene Dahl Olesen | 54 90 10 | renedo@faroeship.fo |
| D16 | Høvuðsvenjari | Gunnar Djurhuus | 21 90 82 | gunnardjurhuus@gmail.com |
| D16 | Hjálparvenjari | Bogi Davidsen | 27 67 04 | bd0206u7@skulin.fo |
| D16 | Hjálpari | Anna Dam | 51 90 82 | ad@lawfirm.fo |
| D14 | Høvuðsvenjari | Rógvi Sørensen | 25 21 19 | rs0504e7@skulin.fo |
| D14 | Hjálparvenjari | Halgir Dahl Olesen | 54 90 10 | halgir@faroeship.fo |
| D14 | Hjálparvenjari | Sigmundur Dahl | 27 61 31 | sigmundur_14@hotmail.com |
| D12 | Høvuðsvenjari | Bogdan Florea | 58 15 69 | simoni_k_06@yahoo.com |
| D12 | Hjálpari | Janet Johannesen | 21 22 11 | jj@atlanticon.fo |
| D12 | Hjálparvenjari | Hallur Biskopstø | 51 76 06 | hillar_1993@hotmail.com |
| D10 | Høvuðsvenjari | Petur Mittún | 21 82 84 | peturmittun@gmail.com |
| D10 | Hjálparvenjari | Jens Skipagøta | 28 03 25 | jens.a.skipagoetu@skulin.fo |
| D10 | Hjálparvenjari | Rúni Poulsen | 21 11 11 | runi@smyril-line.fo |
| D10 | Hjálparvenjari | Karl Oddmar Rasmusen | 50 83 38 | karlor@live.dk |
| G17 | Høvuðsvenjari | Fríðrikur Jakobsen | 27 50 74 | fridrikur@email.com |
| G17 | Hjálparvenjari | Kristian Dan Sørensen | 25 02 15 | kridazo93@gmail.com |
| G14 | Høvuðsvenjari | Petur Martin Johansen | 29 62 60 | koffiann@olivant.fo |
| G14 | Hjálparvenjari | Andor Sivertsen | 50 71 29 | andor95@gmail.com |
| G14 | Hjálpari | Rene Dahl Olesen | 54 90 10 | renedo@faroeship.fo |
| G12 | Høvuðsvenjari | Hallur Danielsen | 23 96 15 | had@sbw |
| G12 | Hjálparvenjari | Tróndur Arge | 31 55 57 | trondurarge@hotmail.com |
| G10 | Høvuðsvenjari | Tróndur Joensen | 27 26 28 | tjoensen@hotmail.com |
| G10 | Hjálparvenjari | Hendrik Egholm | 23 74 10 | hendrik@magn.fo |
| G10 | Hjálparvenjari | Ann Ellefsen | 51 56 85 | annellefsen@gmail.com |
| D8 | Høvuðsvenjari | Rúni Højgaard | 26 14 15 | runi_hoyvík@hotmail.com |
| D8 | Hjálparvenjari | Høgni Olafsson | 58 56 31 | hognio@yahoo.com |
| G8 | Høvuðsvenjari | Eindri Frýdal | 27 48 04 | eindri94@hotmail.com |
| G8 | Hjálparvenjari | Páll Mortensen | 59 72 01 | pm3012f3@skulin.fo |
| U6 | Høvuðsvenjari | Beinta Ejdesgaard | 72 35 52 | beintaej@hotmail.com |
| Ungdóms | Málmansvenjari | Ári Egason Dam | 51 20 90 | aed@eik.fo |

# LEIKUM FAGURT

## TIL LEIÐARAR, VENJARAR, DÓMARAR, FORELDUR, LEIKARAR OG ÁSKOÐARAR

LEIKUM FAGURT

- HAV JALIGAN ATBURÐ
- ROYN ALTÍÐ TÍTT BESTA
- VÍS VIRÐING FYRI ØÐRUM
- UMBOÐA FELAGIÐ SØMULIGA
- FAR VIÐ ØÐRUM, SUM TÚ YNSKIR, AT ONNUR FARA VIÐ TÆR

LEIKUM FAGURT

EIN HEILSAN OG ÁHEITAN FRÁ

H71

TIL ALLAR H71'ARAR OG ONNUR, IÐ KOMA Í HOYVÍKSHØLLINA

# VÆLEYDNAÐ BINDIKLUBBA TREFF



Myndir: Elin Winther Poulsen



*Eftir: Elin Winther Poulsen*

FYRSTA FRÍGGJAKVØLDIÐ Í MARS VAR SERA VÆLEYDNAÐ BINDI- OG HUGNAKVØLD Í SKÚLANUM VIÐ LØGMANNABREYT. TAÐ VÓRU G14, SUM SKIPAÐU FYRI, OG ENDAMÁLIÐ VAR – UMFRAMT AT BINDA – AT SAVNA PENING TIL PARTILLE FERÐINA.

Á SKRÁNNI VÓRU MILLUM ANNAÐ LIVANDI TÓNLEIKUR OG MÁLNINGAFRAMSÝNING.

Millum 130 og 140 kvinnur í øllum aldri vóru møttar og tær fingu nógv fyri atgongumerkið: Umframt tertur, salat, kaffi og køkur, var eisini ymiskt undirhald á skránni, eins og til bar at keypa tógv og annað, sum hoyrir bindingini til. Tógvhandlarnir, Igloo í Havn og Tova í Klaksvík høvdu framsýningar- og sølubásar og áhugin fyri teirra vørum var rættiliga stórur. Harafturat høvdu listakvinnurnar, Inga Samuelsen og Ann-Mari B. Mouritsen, framsýning. Tær høvdu hongt nógvar vakrar málningar upp til høvið.

Eftir at kvinnur – tí eingir menn vóru komnir við stokkunum – høvdu fingið ein bita, var fyrst ein sera áhugaverdur fyrilestur: Randi Samsonsen, sniðgevi, greiddi frá kreativari binding. Bæði áhugavert og undirhaldandi!

Síðani spældu fýra ungir sheikar nøkur løg: Við feitum, jazzutum tónum spældu Halgir, Matthias, Robert og Kristian Pauli seg inn í øll damuhjørtuni !

Alt kvøldið bar eisini til at keypa lutaseðlar og at enda drógu Annika og Sigrid seðlarnar, so glaðu vinnararnir kundu fara heim við sínum vinningum.

Avgjørt eitt fínt tiltak, sum helst verður endurtikið ☺













Myndir: Elin Winther Poulsen

# TAÐ BURDI VERIÐ GULL, MEN SILVUR ER GÓÐKENT




*Eftir: Agga Niclasen*

Dreingir 12 spældu avgerandi dystir um at vinna FM í dag. Tíverri gekk ikki sum H71 hevði prædikað, tí teir blivu akkurát ov stuttir. Kortini, silvur kom heim, og tillukku við tí. Tað er bara at koyra á, venja uppaftur harðari og konsentrerað, og við hesum gerast betri hondbóltsleikarir. Lukkutíð, eins og við summarinum og landsstýrismonnum, so kemur altíð eitt nýtt kappingarár, har møguleiki er at betra seg.

H71sa kappingarneytar í deildini eru tó góðir. Tjaldur hevur eitt gott lið undir kønari leiðslu av Johan Danielsen, meðan Neistamenn eru óvanliga raskir. Vit ynskja hervið Neistanum tillukku við FM:)

# SLÆTT BORÐ HJÁ G12A 2013-14





Røsku 2000-diddurnar hjá H71 hava vunnið hvønn tár og ting í ár. Tillukku við tí!

Tað ber ikki til at brúka orðið "greipa", tí tær hava vunnið fleiri enn tvær kappingar í ár hjá gentur 12. So vit víðka hugtakið, eitt sindur reyput, men fitt, til "slætt borð", tá ið H71-genturnar hava vunnið fýra út av fýra kappingum.

Njótið meistaraheitið, sum tit vunnu á Skála ídag aftaná ein strævnan dyst ímóti einum vælleikandi Kyndla-liði; men í morgin, ella ovurmorgin--ókey, eina viku, meðni!--fara hasar medaljurnar upp á ovasta loft at savna dust til tess betri at miðsavna seg um næstu uppgávu fyri framman.

Altso... fyri at taka samanum:
Night Cup: tjekk
Heystkappingin: tjekk
Steypavinnarir: tjekk
Føroyameistarir: tjekk

Harumframt vann H71b silvur í B-bólkinum, og koma tær at mynda a-liðið næsta ár. Vit gleða okkum longu og ynskja teimum tillukku við metallinum.

# TEY SVØRTU TØLINI

## DYSTARYVIRLIT HJÁ H71 Í ATLANTIC AIRWAYS DEILDINI

| Dato | Heimalið | Útilið | Úrslit |
|---|---|---|---|
| 23.09.2012 | Kyndil | H71 | 25-27 |
| 30.09.2012 | H71 | Neistin | 24-23 |
| 07.10.2012 | H71 | KÍF | 27-31 |
| 13.10.2012 | StÍF | H71 | 31-26 |
| 04.11.2012 | VÍF | H71 | 26-30 |
| 06.11.2012 | H71 | T. Klaksvík | 34-15 |
| 11.11.2012 | H71 | Kyndil | 31-25 |
| 18.11.2012 | Neistin | H71 | 28-27 |
| 25.11.2012 | KÍF | H71 | 29-21 |
| 01.12.2012 | H71 | StÍF | 22-20 |
| 14.12.2012 | T. Klaksvík | H71 | 21-37 |
| 22.12.2012 | H71 | VÍF | 33-28 |
| 06.01.2013 | Kyndil | H71 | 22-21 |
| 12.01.2013 | H71 | Neistin | 31-25 |
| 20.01.2013 | H71 | KÍF | 27-25 |
| 03.02.2013 | StÍF | H71 | 28-26 |
| 23.02.2013 | H71 | T. Klaksvík | 25-19 |
| 03.03.2013 | VÍF | H71 | 22-22 |
| 09.03.2013 | H71 | Kyndil | 24-18 |
| 14.03.2013 | Neistin | H71 | 19-20 |
| 23.03.2013 | KÍF | H71 | 21-20 |
| 27.03.2013 | T. Klaksvík | H71 | 24-32 |
| 14.04.2013 | H71 | StÍF | |
| 20.04.2013 | H71 | VÍF | |

## STØÐAN ATLANTIC AIRWAYS DEILDIN

| Nr. | Lið | Dystir | V.m | T.m. | Munur | Stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | KÍF | 22 | 642 | 504 | 138 | 35 |
| 2 | H71 | 22 | 587 | 525 | 62 | 29 |
| 3 | VÍF | 22 | 631 | 563 | 68 | 28 |
| 4 | StÍF | 23 | 571 | 540 | 31 | 25 |
| 5 | Kyndil | 23 | 596 | 595 | 1 | 23 |
| 6 | Neistin | 22 | 533 | 572 | -39 | 16 |
| 7 | T. Klaksvík | 22 | 457 | 718 | -261 | 0 |

# LIÐINI HESUFERÐ

## H71

**Málmenn:**

1 Ári Egason Dam

12 Tóraldur Kollsker

**Útileikarar:**

4 Rúni Vest Højgaard

14 Sigmundur Dahl

2 Rógvi Sørensen

15 Sigmundur Nolsø

17 Hallur Biskupstø

13 Bogdan Florea

9 Ári Jógvansson Olsen

7 Bogi Gaard Davidsen

11 Hans Kári Hansen

6 Tróndur Arge

10 Poul Kjartan Dam

3 Niels Viggo Niclasen

*Høvuðsvenjari:* **Petur Mittún**

*Venjari:* **Halgir Dahl Olesen**

*Málmansvenjari:* **Jens á Skipagøtu**

*Liðleiðarar:* **Andrass Marr Poulsen, Lars Tornefelt og René Dahl Olesen**

## StÍF

**Útileikarar:**

1. Levi Nybo
2. Johan R. Nielsen
3. Leivur Justinussen
4. Fríði R. Djurhuus
5. Jógvan Berg
6. Sveinur Justinussen
7. Jón Rasmussen
8. Jógvan G. Joensen
9. Marius Joensen
10. Høgni Jensen
11. Janus Bertelsen
12. Jákup Bertelsen

*Bonkur:* **Aleksandur Johansen**
**Rósing Hansen**

»GOTT ER AT HAVA GÓÐAN Í RÁÐUM«



ADVOKATFELAGIÐ VIÐ STROND 4

YVIRI VIÐ STROND 4 · TEL 203040 · FAX 203041 · P.O. BOX 359
FO-110 TÓRSHAVN · FAROE ISLANDS
LAWFIRM@LAWFIRM.FO
WWW.LAWFIRM.FO

JÓGVAN PÁLL LASSEN · PETUR EVEN DJURHUUS
JÓGVAN E. ELLEFSEN · ANNA DAM · INGI HØJGAARD
GUNN ELLEFSEN · MIMI STEINTÓRSDÓTTIR

SENDISTOVAN